TRYGD • TÆNASTA • TRIVNAÐUR

- størri TRYGGLEIKA í ferðsluni

# SKRIVSTOVUFÓLK

**Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akstovuna til at byrja skjótast tilber. Talan er um parttíðarstarv.**

**UPPGÁVAN**
Uppgávan fevnir m.a. um:
- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Sýnsumsiting

**FØRLEIKAKRØV**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á at ein hevur góð samstarvsevni og at viðkomandi er fyrikomandi og tænastuhugaður. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

**SETANARTREYTIR**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jákup Jacobsen, stjóra, á telefon 350400.
Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða okkum í hendi í **seinasta lagi 20. august 2007.**

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyrироyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjald og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir kring alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

AKSTOVAN

Hoyvíksvegur 57 • Postsmoga 3206 • FO-110 Tórshavn
Tel. 35 04 00 • Fax 35 04 01 • www.akstovan.fo • akstovan@akstovan.fo

# Verkfrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi til projektering og eftirlit innan byggi- og anleggsarbeiði, har arbeiðsøki í høvuðsheitinum fevnir um projektering av stál- og betongkonstruktiónum.

Vit leggja dent á góð evnir at samstarva, og at tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst.

Neyðugt er at hava kunnleika til arbeiði við AutoCad, Word og Excel. Telduforrit til statik v.m. kunnu lagast eftir egnum ynski, um tú ert vanur við onnur enn tey vit nýta.

Vit kunnu bjóða góðar arbeiðsumstøður og løn í mun til útbúgving og royndir. Møguligar útreiðslur í samband við flyting verða endurgoldnar sambært avtalu.
Hóast tú nýliga ert liðug/ liðugur við útbúgvingina ert tú vælkomin at søkja.

Skrivlig umsókn við viðkomandi skjølum skulu vera okkum í hendi innan 17.08.2007.
Umsóknin verður viðgjørd í trúnaði.

Nærri lýsing av starvinum kann fáast við at venda sær til Magnus P. Gaard á 515581, teldupostur mpg@vfs.fo

**Verfrøðingastovan**
Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.
Mannbrekka 16, FO 188 Hoyvík
Telefon 315294, mail-vfs@vfs.fo



# SKEMMAN søkir handilslærling

## Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar góðar fyrimunir

www.skemman.fo

**Vit bjóða:**
- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum – bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
- Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
Samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi, arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Íslandi, Kanada, Letlandi, Litava og Estlandi. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 20 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 1000 arbeiðspláss tilsamans, á øllum deildunum í teimum 7 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark. Gjøgnum samstarvið við Jysk, fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jútlandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanliga handilsútbúgving. Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

Hevur hetta tín áhuga, send so eina skrivliga umsókn til:

***SKEMMAN***
***Staravegur 7 · Postboks 3278 · 110 Tórshavn***
***ella á teldupost: skemman@skemman.fo***

Meira fæst at vita um læruplássið við at ringja 315588 og spyrja eftir Dan.

Staravegur 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 31 55 88 · www.skemman.fo

SKEMMAN

Matstovan í Hoyvík

## *Smyrjibreyðsjomfrú til Matstovuna í Hoyvík*

Matstovan í Hoyvík søkir eftir smyrjubreyðsjomfrú fulla tí um dagin, at byrja sum skjótast.

Løn: Sáttmáli millum handverkarafeløgini og arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Maud Matras matstovuleiðara á tlf. 314149.

Skrivlig umsókn skal sendast áðrenn 14. august til

**Matstovan**
**FK Hoyvík**
**Box 349**
**188 Hoyvík**

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!

Sosialurin
Sosialurin
i